## Samband í eitt ár

**Sunnudagin er eitt ár síðani Klaksvík fekk fast samband við meginøkið.**

**Dagurin varð hátíðarhildin við nógvum ymiskum tiltøkum í Klaksvík og Leirvík, nú ein á fyrsta sinni kundi koyra undir Leirvíksfjørð.**

**Í Klaksvík vóru fólk sera spent uppá tær avleiðingar sum hesin framburðurin mundi fáa fyri teirra heimbý.**

**Handilsfólkini vóru ikki minni spent, nú teirra marknaður varð víðkaður til at fevna um meiri enn 80% av landinum.**

**Í samband við eitt ára dagin fara handlarnir at spenna seg út. Nógv fólk kunnu væntast til býin at vitja teir mongu handlarnar, tí ókeypis er at koyra.**

**Hinvegin kemur haraftrat nógv fólk úr Norðstreymoy og Eiðis-leiðini til Klaksvíkar sunnudagin. Tá verður nevniliga ein spennandi dystur í Formuladeildini millum KÍ og EB/Streym.**

# Handlarnir hava gott orð á

*Henda kvinnan hevði eisini lagt merki til, at starvsfólkini tosaðu vinarliga við hvønn annan. Tey kundu hinvegin gott prika hini eitt lítið sindur, men tað varð alt gjørt við einum positivum "glimti" í eyganum.*

**– Tað kann vera at tænastan her er sum í einum útjaðara. Men so vil eg samstundis sláa fast, at útboðið av vørum er sum í einum stórbýi, sigur Magnus Arge, handilsmaður í Klaksvík.**

**Hann er sjálvur formaður í Handilsfelagnum í Klaksvík. Felagið spennir seg rættiliga út hetta vikuskiftið, nú eitt ár er liðið síðani Norðoyatunnilin læt upp**

TUNNILSHANDIL
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** – Vit hoyra tað allatíðina frá fólki, um hvussu stórt útboðið er, hvussu fjølbroytt handilslívið er og hvussu góða tænastu vit veita viðskiftafólkunum.

- Og fólk leggja eisini merki til tann serstaka blíðskapin, tey verða møtt við í handlum okkara, sigur Magnus.

Í felagnum eru flestu handlarnir í Klaksvík. Síðani tunnilin lat upp 29. apríl í fjør er onkur latin aftur, meðan onkur heilt nýggjur handil letur upp til eitt ára dagin.

Teir 63 handlarnir í felagnum hava hesa vikuna sent út sína vøruskrá til húsarhald kring alt landið. Í samband við dagin hava teir opið sunnudagin frá kl. 14 til 23.

*Tað kann vera at tænastan her er sum í einum útjaðara. Men so vil eg samstundis sláa fast, at útboðið av vørum er sum í einum stórbýi*

### Vón og veruleiki

Tá dagurin fyri sjálvari upplatingini av Norðoyatunlinum byrjaði at nærkast fyri einum ári síðani, fóru handilsfólk og fólk á gøtuni í Klaksvík av álvara at hugsa um, hvønn týdning hetta framstigið kundi fáa fyri heimbý teirra.

Nógvir handlar gjørdu eitt stórt arbeiði við veruliga at gera sítt til, at viðskiftafólkini skuldu koma inn í dagførdar handlar. Í døgunum frammanundan var nærum ikki hyggjandi inn í nógvar handlar, tí har var klistrað fyri vindeyguni, tí tey vóru í ferð við at nútíðargera og broyta handlarnar til tær broyttu umstøðurnar.

Handilsfólkini vóru sum vera man sera spent uppá henda møguleikan. Og fleiri teirra gjørdu uttan iva vónir um økt virksemi, øktan handil og ein hóp av viðskiftafólkum, bæði hesumegin og hinumegin tunnilin.

Eingin visti rættiliga, hvørjar vónir ein kundi seta til framtíðini. Eitt mundi kortini vera greitt: Nógv nýggj andlit fóru at verða í handlunum.

Nú, eitt ár seinni, man helst vera ymiskt, hvussu hevur skorist hjá teimum einstøku handlunum. Onkur setti kanska alt ov stórar vónir, meðan aðrir gjørdust bilsnir yvir áhugan frá fremmandafólkinum.

Tá ein tosar við handilsfólk í Klaksvík eru tey samd um, at viðskiftafólkini eru vorðin munandi fleiri. Helst er sølan økt tilsvarandi.

Tað er helst so sum ein teirra tók til: - Fyrr kendi eg allar mínar kundar. Tað geri eg fyri sovítt enn, men nú eru bara komnir so nógvir nýggir aftrat!

Hetta er kanska besta prógvið um tann týdning, sum Norðoyatunnilin hevur havt fyri handilslívið í Klaksvík.



*- Hóast handlarnir í Klaksvík hava nógv viðskiftafólk aðrastaðni frá, mugu vit ikki sovna. Vit mugu allatíðina hyggja frameftir, sigur Magnus Arge, formaður í Handilsfelagnum*

*Mynd: Snorri Brend*

### Tænasta og útboð

Magnus Arge staðfestir í øllum førum, at handilsfólkini lata væl av hesum seinasta árinum.

Hinvegin veit hann frá fremmandafólkinum, at tey hava eisini gjørt sær sínar hugsanir um handilslívið í Klaksvík. Og tað er sum heild sera positivt!

- Tey geva okkara handlum eitt sera gott umdømi. Tey siga, at tænastan er sera góð, og at tað sama ger seg galdandi við útboðnum av vørum, sigur Magnus.

Hann sigur frá eini konu, hann tosaði við, og sum helt tað vera so stuttligt at handla í Klaksvík.

Hon helt, at samskiftið millum starvsfólkini í handlunum var sera gott og at har var ein lættur tóni. Handilsfólkið ger eisini alt fyri at vísa, at kundin er vælkomin og at tey vilja veita honum ta bestu tænastuna.

### "Glimt" í eyganum

Henda sama kvinnan hevði eisini lagt merki til, at starvsfólkini tosaðu vinarliga við hvønn annan. Tey kundu hinvegin gott prika hini eitt lítið sindur, men tað varð alt gjørt við einum positivum "glimti" í eyganum.

– Hetta var alt gjørt, meðan kundin lýddi á. Og sambært hesi konuni gjørdi alt hetta sítt til, at hon føldi seg sera væl í handlinum, greiðir Magnus frá.

Hetta góða umdømið frá viðskiftafólkunum kring alt landið er sjálvandi eitt herðaklapp til handlarnar. Men tað er eisini ein vandi í tí.

- At vit eru so góð, sum fólk siga, má ikki gera tað, at vit sovna. Skulu vit framvegis standa okkum í kappingini, eru neyðugt at vit eru vakin og fylgja við tíðini, slær Magnus fast.

### Handlarnir eru OK

Tað eru kortini ikki ber handlarnir í Klaksvík sum hava fingið ágóðan av Norðoyatunlinum.

Teir dagarnar, tá ókeypis er at koyra, gera handlarnir í Havn og Runavík nógv burtur úr og hava eisini serstøk tunnilstilboð.

Men fyri Magnus Arge hevur hetta ikki so nógv av týða kortini.

– At klaksvíkingar fara aðrastaðni at vitja handlarnar ger fyri sovítt ikki so nógv.

– Mín vón er bara, at teir tá bæði kunnu síggja og staðfesta, at handlarnir her í Klaksvík eru í fínasta slag!, slær formaðurin í Handilsfelagnum fast.